SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

Sept., 2014

# IMO: Kunning til skiparar og eigarar um týdningarmestu broytingar í SOLAS – galdandi frá 1. juli fyri <u>verandi</u> skip

**I Brunaverjuútgerð / andingarútgerð – roykkavarafløskur við trýstluft**

Við SOLAS reglu II-2/10.10.1, sum broytt við samtykt MSC.338(91), verður nýtt krav sett í gildi til ***øll*** skip – ikki bara fyri tangaskip – ið eru bygd og latin eigara eftir 1. juli 2014.

Sambært FSS-reglugerðini, kap. 3, stykki. 2.1.2.2 er kravið:

> "Fløskur við trýstluft skulu vera útgjørdar við ljóðávaring/alarmi umframt sjónligum ávaringartóli, ið ávarar brúkaran, tá ið iltmongdin í fløskuni fer niður ímóti 200 litrum."

*Eng: compressed air breathing apparatus shall be fitted with an audible alarm and a visual or other device which will alert the user before the volume of the air in the cylinder has been reduced to no less than 200 l.*

Innan 1. juli 2019 skulu øll skip lúka reglunum fult út.

**II Tvívegis handbær radiotól**

Við SOLAS reglu II-2/10.10.4, sum broytt við MSC.338(91), kemur nýtt krav um, at í minsta lagi tvey tvívegis handbær radiotól skulu vera tøk fyri hvørt sløkkilið umborð, fyri at bøta um samskiftismøguleikar undir sløkkingararbeiði. Tólini skulu vera av sprongtryggum slagi og bjálvað ímóti hita/eldi.

Kravið til mongd av tólum er grundað á talið av sløkkiliðum, sum víst í "brandrulluni" og ikki á mongdina av eldsløkkidraktum.

Verandi skip, bygd áðrenn 1. juli 2014, skulu lúka krøvunum í hesi reglugerð í seinasta lagi við fyrsta sýn eftir 1. juli 2018.

**III Undirvísing – venjing um borð**

Við SOLAS reglu II-2/15.2.2.6, sum broytt við samtykt MSC.338(91), verður nú kravt, at øll skip skulu hava umborð, annaðhvørt útgerð til at fylla roykkavarafløskur, sum verða nýttar undir venjing, ella at hóskandi mongd av eyka fløskum skulu vera umborð at seta í staðin fyri tær brúktu.

IACS fyrireikar í løtuni einsháttað tulking viðvíkjandi, hvat er "hóskandi mongd" av fløskum. Yvirskipað kann sigast, at Sjóvinnustýrið fer at góðkenna slíka einsháttaða tulking frá IACS og IMO, tá ið henda verður tøk.

Verandi tekstur í SOLAS Reglu III/19.2.2, sum krevur, at ferðafólk skulu hava trygdarleiðbeining innan 24 tímar eftir komu umborð, er nú broytt til:

- "trygdarleiðbeining skal veitast ferðafólkum áðrenn ella beint aftaná, at skipið leggur frá kai"

Eng.: *muster of newly embarked passengers shall take place prior to or immediately upon departure*.

**IV At bjarga fólki upp úr sjónum** – sí eisini ***Tíðindabræv 18/2013 – rakstur frá Sjóvinnustýrinum***

Við nýggjari SOLAS reglu III/17-1 verður nú kravt, at øll skip skulu hava serstaka mannagongd fyri skipið, hvussu manningin skal bjarga fólki upp úr sjónum.

Mannagongdirnar skulu eyðmerkja útgerð, sum skal nýtast í bjargingararbeiðinum, umframt tey stig, sum skulu takast til tess at minka um váðan fyri tey, ið taka lut í bjargingini.

**Gevið gætur 1:** Verandi skip skuldu lúka krøvunum 1. juli 2014. Ro-ro ferðamannaskip, sum lúka SOLAS-reglu III/26.4 lúka longu hesum krøvum.

Rundskrivið MSC.1/Circ.1447 – *Guidelines for the Development of Plans and Procedures for Recovery of Persons from the Water* skal hjálpa rakstrarfeløgum við at fyrireika slíkar skipsserstakar bjargingar-mannagongdir,.

Hesar vegleiðingar eiga at verða lisnar saman við vegleiðingini frá IMO um bjargingarhættir í rundskrivi MSC.1/Circ.1182 og vegleiðingini um at hóra undan í <u>køldum</u> vatni, sí MSC.1/Circ.1185/Rev.1. Hetta seinna, dagførda skrivið frá IMO er nú lagt afturat Tíðindabrævi <u>18/2013 – rakstur</u> frá Sjóvinnustýrinum..

**Gevið gætur 2:** Nýggju mannagongdirnar verða at rokna sum partur av tilbúgvingini hjá skipinum, sum kravt undir stykki 8 í **ISM**-reglugerðini.

SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

**V Útinningarevni hjá VDR - krøvini endurskoðað**

1. Er útgerðin ísett eftir 1. juli 2014, skal VDR lúka krøvunum sum ásett í samtyktMSC.333(90), og
2. Er útgerðin ísett áðrenn 1. juli 2014, skal hon lúka krøvunum sum ásett í samtykt A.861(20), og dagførd við MSC.214(81).

IACS einsháttað tulking *UI SC261* greinar Res.MSC.333(90) og skilmarkan av "ísett eftir 1 juli 2014". Til ber at kanna hetta skriv, tá ið ivamál er, hvørt kravið er galdandi..

**VI Streymlagan av SOLAS-sertifikatum og skjølum**

Sniðið av sertifikatum og skjølum verða broytt og endurnýggjað sambært tí sum víst í samtykt MSC.338(91), MSC.343(91) og MSC.344(91).

Hesar broytingar eru gjørdar til tess at minka um talið av skjalfestingum av útgerð og at dagføra krøv til skjalfestingar av útgerð (Form P, Form E, Form R og Form C). Nýggju útgávurnar av skjølum sampakka nú við verandi krøv. Millum annað, eru skjalfestingar av útgerð dagførd viðv.:

- rýmingarútgerð,
- bjargingarbátum,
- yvirlivingardraktum
- lívvestar fyri børn og pinkubørn og
- Inmarsat Satellite EPIRB.

Verandi sertifikat og skjøl verða skift út við tey nýggju í sambandi við næsta skipssýn. Kortini, tí at broytingarnar ikki hava við sær tekniskar broytingar, ber til hjá eigarum so skjótt sniðið er gjørt at biðja um nýggju útgávuna av sertifikatum og skjølum, uttan at noyðast at bíða til tað gamla gongur úr ella til næsta sýn.

**VII Verja ímóti larmi**

Nýggja reglan í Kap. II-1 reglu 3-12.2 hevur somu ásetingar sum reglan í kap. II-1 reglu 36, og verður strikað tá ið broytingar av SOLAS komu í gildi 1. juli 204 við samtykt MSC.338(91). Til hesar seinastu broytingar komu í SOLAS hava føroysk krøv verið strangari enn altjóða reglurnar.

Meðan bíðað verður eftir nýggja regluportalinum hjá Sjóvinnustýrinum (sum verður settur á stovn frá 1. januar 2015), verður víst til ensku útgávuna av donsku Meddelelser A, sum fult út sampakkar við føroysku reglurnar um heilsu og umhvørvi á starvsplássinum: Enska útgávan her

Gevið gætur, at fyri verandi skip, og fyri skip latin eigara áðrenn 1. juli 2018, eru nýggju krøvini ikki galdandi:

1) tá ið byggisáttmáli er gjørdur áðrenn 1. juli 2014, og kjølur strektur ella byggingin har á leið komin tann 1. januar 2009 ella eftir hetta;
2) somuleiðis tá ið eingin byggisáttmáli er, og kjølur strektur ella byggingin har á leið komin tann 1. januar 2009 ella aftaná.
   - Í báðum førum er galdandi fyri undantakið, at kjølur skal vera strektur ella byggingin har á leið komin áðrenn 1. januar 2015.

Encls.: MSC.214(81)
MSC.333(90)
MSC.338(91)
MSC.343(91)
MSC.344(91)
MSC.1/Circ.1182
MSC.1/Circ.1185/Rev.1
MSC.1/Circ.1447

--- 00 ---